## Løgreglan tók hvalin

Nakrir veiðimenn í Ilulissat í Grønlandi fingu ikki stóra gleði av einum náhvali, sum teir skutu nú um dagarnar. Veiðimenninir fingu hvalin upp á land og skóru hann upp, men teir vóru valla lidnir, tá løgreglan kom á staðið og legði hald á bæði spik og tvøst, sigur KNR. Orsøkin er, at tað er banna at veiða náhval. Finn Karlsen, landsstýrismaður í fiski- og veiðialum, sigur, at tilburðurin kemur illa við, nú altjóða hvalaveiðinevndin heldur ársfund.



## Fakfelag fyri sjálvstýri

Tann 25. novembur verður fólkaatkvøða í Grønlandi um sjálvstýri, og tá fer arbeiðarafelagið SIK at mæla sínum limum til at atkvøða fyri. Formaðurin, Jens G. Berthelsen, sigur við blaðið AG, at SIK fer at nýta eitthvørt høvi til at virka fyri grønlendskum sjálvstýri og tí eisini á fólkaatkvøðuni í heyst. Hann sigur, at mál felagsins er, at grønlendingar skulu ráða í Grønlandi, og at grønlendskt verður tað almenna høvuðsmálið.

# Allur heimurin hittist í Myk

**Skal ein hitta fólk úr øllum heiminum á einum lítlum og hugnaligum staði, so er Mykines ein hentur møguleiki. – Vit í Kristianshúsi gera alt fyri at fólk skulu kenna seg væl, sigur Katrina Johannesen, sum rekur hesa matstovuna og gistingarhúsið**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Mykines:** Leygardagin verður Kristianshús uttan iva fullsett av stevnugestum.

Útoyggjafelagið hevur nevniliga sett Mykines sum vert fyri árligu Útoyggjastevnuni. Og fyri tey, ið ynskja ein bita ella ein kaffimunn, er Kristianshús ein avgjørdur møguleiki.

Vanliga eru ikki so nógv fólk í bygdini sum væntandi

> *Tað er heilt týðiligt, at tey hava lisið uppá frammanundan*

eru til eina slíka stevnu. Men talið av vitjandi hevur seinastu árini verið rættiliga støðugt.

- Vit hava so ikki havt minni at gjørt, staðfestir Katrina Johannesen.

Summi at teimum vitjandi vilja vera í góðari tíð, og biðja um gisting langt frammanundan. Onnur eru ikki so skjót, og bíleggja við eini skjótari avgerð, beint áðrenn tey fara út í Mykines.

### Allir aldursbólkar

Tað man hoyra til undantøkini, at tú á eini av smærru útoyggjum okkara hevur møguleika bæði at keypa tær mat og at gista á einum og sama staði.

Men tað er júst ein partur av ætlanini við Kristianshúsi. Her kunnu fólk bæði fáa heitan mat, smyrjibreyð,



*Elsa F. Petersen úr Klaksvík (vinstrumegin) arbeiðir hjá Katrinu Johannesen í Kristianshúsi hetta summarið*



*Kristianshús eitur eftir manninum sum bygdi húsið. Í dag leigar Katrina Johannesen (vinstrumegin) og rekur tað sum matstova og gistingarhús. Eitt av starvsfólkum hennara er Elsa F. Petersen úr Klaksvík, sum arbeiðir saman við einum »Nordjobbara« úr Svøríki*

grillmat og allar vanligar kioskvørur.

Hjá teimum, ið hava hug at gista er eisini møguleiki til tað, í smærri og størri rúmum. Er talan um ein bólk uppá 40 fólk, so er eisini pláss til ein slíkan.

Hóast vit eru staddir á vestastu oyggj okkara, hevur tað eydnast Katrini og føroysku ferðavinnuni at marknaðarføra hetta konseptið so væl, at higar leita fólk sær úr øllum heiminum – og úr øllum heimspørtum.

Fíggjarliga orkan at lýsa við gistingini og matstovuni er sjálvandi avmarkað. Tey hava havt lýsingar í onkrum tíðarritum, hava luttikið á onkrum ferðavinnustevnum og hava eina heimasíðu við hentum upplýsingum um Kristianshús og Mykines.

Tað er kortini líkt til, at Kristianshús er spurt millum fólk í øllum aldursbólkum – og úr øllum heiminum.

- Ja, higar koma bæði føroyingar, danir, týskarar, bretar, fransmenn og onnur, eins og fólk úr Belgia (sí aðra grein á síðuni), og eisini fólk heilt úr Canada, greiðir hon frá.

Vanliga er opið frá 1. mai og til 1. september. Hetta forðaði kortini ikki einum pari úr Týsklandi við barni at leggja leiðina allan vegin vestur í Mykines á páskum.

### Áttu steðgað longri

Fyri fólkið aftanfyri Kristianshús hevur tað allatíðina verið eitt ynski um at geva fólki møguleika at fáa sær ein bita og fyri yvirnátting.

Tey flestu sum vitja í Mykinesi steðga bert nakrar fáar tímar. Tey koma út um morgunin og fara inn aftur seinnapart á degi, og halda seg so hava sæð Mykines.

- Eg haldi sjálv, at tað er alt ov stutt hjá fólki bara at steðga herúti í ein dag. Her er jú so nógv at síggja og uppliva, sigur Katrina Johannesen.

Frá gistingarhúsinum sjálvum gera tey ymiskar túrar við ferðaleiðara, millum annað niðan á Knúk, til eitt øki tey nevna Steinskógin ella í Korkadal.

- Tey áttu at givið sær betri tíð, soleiðis at tey veruliga kundu uppliva, hvussu tað er at vera her í oynni, sigur hon.

> *Tey áttu at givið sær betri tíð, soleiðis at tey veruliga kundu uppliva, hvussu tað er at vera her í oynni*